Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 5

ISSN 0907-905X

Nr. 15 25. februar 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um kringvarpsgjald**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 106 frá 18. november 2010 um kringvarpsgjald, verður § 2, stk. 1 orðað soleiðis:

„**§ 2.** Húski kunnu verða frítikin fyri at rinda kringvarpsgjaldið, um hesar umstøður gera seg galdandi:
1) tað er próvfast, at eingin í húskinum nýtir tænasturnar hjá Kringvarpi Føroya vegna likamligt ella sálarligt brek,
2) einans hjálpitól, ið hava annað endamál enn at móttaka sendingar hjá Kringvarpi Føroya, eru í húskinum, ella
3) um húskið er miðnámsskúlanæmingur, sum býr einsamallur og ikki er fyltur 22 ár við skúlaársbyrjan.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri innkrevjingina av kringvarpsgjaldinum í 2011 og frameftir.

Mentamálaráðið, 25. februar 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 16 2. mars 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 21. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 2, nr. 4 verður „barnaforsorgarlógini" broytt til: „barnaverndarlógini".

2) Í § 3 verður sum stk. 3 sett:
„*Stk. 3.* Uppiheldur barnið sær fyribils uttanlands í útbúgvingarørindum í upp til eitt ár, verður sæð burtur frá stk. 2, nr. 2."

3) § 5 verður orðað soleiðis:
„**§ 5**. Gjald kann verða kravt útgoldið forskotsvís við tí upphædd, sum er ásett við heimild í lógini um rættarstøðu barnanna, tó í mesta lagi við eini upphædd, ið svarar til tað vanliga gjaldið sambært lógini um áseting og javning av almannaveitingum."

4) Í § 9, stk. 1 verður „Umbøn" broytt til: „Umsókn".

5) Í § 9, stk. 2, 1. pkt. og § 18, 1. pkt. verður „Føroya Gjaldstovu" broytt til: „Almannastovuni".

6) Í § 9, stk. 2, 2. pkt. og § 10, stk. 2, nr. 1 verður „Toll- og Skattstova Føroya" broytt til: „TAKS".

7) § 15, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Um hvørki av foreldrum barnsins er á lívi, rindar tað almenna árliga eitt økt gjald til barnsins uppihald."

8) § 16, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Er tað fyri eitt barn ásett eitt endurgjald til barnið fyri mistan uppihaldara, verður endurgjaldsupphæddin frádrigin í gjaldinum sambært § 15, stk. 1 og stk. 3."

9) Í § 19 b, stk. 1 verður aftan á „búgvandi." sett sum 2. pkt.: „Sí tó § 19 c."

10) § 19 c verður orða soleiðis:
„**§ 19 c.** Barnaískoyti verður bert veitt, um treytirnar í § 3, stk. 2, nr. 1-5 og stk. 3 eru loknar."

11) Í § 19 d, stk. 1 verður: „nr. 1 og nr. 2" broytt til: „stk. 1 og stk. 2".

12) Í § 19 d, stk. 3 verður „umsóknum" broytt til: „málum".

13) Í § 19 d, stk. 5 verður „játtaður" broytt til: „staðfestur".

14) Í § 20 verður „Kærunevndina í Almannamálum" broytt til: „Kærunevndina í almanna- og heilsumálum".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. mars 2011.

Tórshavn, 2. mars 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 70/2010

**Kunngerð um broyting í kunngerð um sjálvbodna trygging**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 63 frá 16. september 2004 um sjálvbodna trygging, sum seinast broytt við kunngerð nr. 13 frá 2. mars 2010, verður § 6, stk. 1 orðað soleiðis:

„Tryggingargjaldið til sjálvbodnu tryggingina sambært § 21 í dagpeningalógini verður fyri tíðarskeiðið 1. apríl 2011 til 31. mars 2012 kr. 5.638.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. apríl 2011

Almannamálaráðið, 25. februar 2011

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705